# Mál- og avrikssáttmáli millum

# Sjúklingahotellið og Heilsumálaráðið

# 2013

## 1. Missión og visión

### Missión:

Sjúklingahotellið Tórshavn hevur til endamáls at hýsa sjúklingum og møguliga teimum, ið varða av sjúklingunum, sum føroyska sjúkrahúsverkið sendir til viðgerðar.

### Visión:

- At fólk kenna seg vælkomin og kunnu ímynda sær føroysk viðurskiftið
- Hava eitt stað, sum hjálpir sjúklingum í tí støðu tey eru í
- Veita stuðul til samskiftið við viðgerðarstøðini í Keypmannahavn
- Lætta um flutning aftur og fram til Føroyar og til og frá viðgerðarstað
- Veita neyðuga upplýsing í sambandi við donsk viðurskifti, ið hava týdning, tá ein skal verða í  Danmark í longri tíð

### Fyri at røkka visiónini, skal Sjúklingahotellið:

Sjá okkara virðisgrundarlag.

- Vera ein stovnur sum veitur virðing yvirfyri gestum og starvsfólkið
- Mennir starvsfólkið til at átakað sær ymiskar og fjøllbroyttar avbjóðingar
- Vísur opinleika og pláss til at rúma øllum
- Hava starvsfólk sum vísa nærverðu í samskiftið við gestirnar
- Hava starvsfólk sum átaka sær ábyrgd av egnum arbeiði og stovninum sum heild

## 2. Inngangur:

Sjúklingahotellið Tórshavn var upprunaliga ein privatur stovnur, sum í 1976 lat upp í einum leigaðum hotelli í Gothersgade, "Hotel Residenz". Primus motor til at upprætta hendan stovn var Karolina Petersen, sum vildi skipa fyri, at sjúklingar, ið vórðu sendir til Ríkissjúkrahúsið í Keypmannahavn og avvarðandi teirra, høvdu møguleika fyri innivist.

Ein nevnd var niðursett og fíggjan av hesum sjálveigandi stovni var lán og tilskot frá privatum stuðlum í Føroyum. Karolina Petersen var forkvinna í hesari nevnd.
Landssjúkrahúsið í Føroyum rindaði fyri innivist hjá sjúklingum og avvarðandi, ið vóru send við. Hotellið var undir leiðslu av hjúnarfeløgunum Jonny og Andreas Joensen til ár 2000, tá flutt varð í størri hølir í Tåsingegade á Eysturbrúgv. Sjúklingahotellið húsast í dag í hølum á Venøgade, tað eru 55 kømur og 5 íbúðir við tilsamans umleið 100 seingjarplássum. 5 av kømrunum eru egnað til fólk ið bera brek.

Sjúklingahotellið Tórshavn er ein stovnur undir Heilsumálaráðnum.

Á Sjúklingahotellinum starvast 20 starvsfólk í føstum starvi og 6 avloysarir.
Starvsfólkini eru sjúkrasystrar, serviceassistentar, kokkar og køksassistentar, ein skrivstovukvinna og ein pedellur.

## Endamálið hjá Sjúklingahotellinum er:

1. At hýsa sjúklingum og avvarðandi teirra
2. Veita praktiska hjálp til sjúklingar
3. Bjóða heilsugóðan mat
4. Bjóða vegleiðing og stuðul, umboða sjúklingin
5. Veita sjúkrarøktauppgávur
6. Fáa í lag samband til sosialráðgeva o.o.

## 3. Fíggjar- og starvsfólkaviðurskifti:

Fíggjarjáttanin til Sjúklingahotellið í 2013 er 14.963 tús. kr. Fíggjarætlan verður løgd við ársbyrjan, so játtanin heldur alt árið. Við støði í fíggjar- og starvsfólkaorkuni hjá Sjúklingahotellinum, verður løgd ein ætlan fyri, hvat verður raðfest í árinum. Sjúklingahotellið Tórshavn hevur 16 ársverk. Sjúklingahotellið skrásetur øll roknskaparskjøl í fíggjarskipan landsins.

## 4. Kjarnuøki

- Innivist til sjúklingar
- Samskipan av flutningi
- Sjúkrarøkt
- Samskipan av sjúklingagongdum
- Samstarv aðrar stovnar
- Matgerð
- Reingerð

## 5. Serligar verkætlanir í 2013 (fokusøki)

- Konsolidera okkum í nýggja hotellinum

## 6. Mál og tiltøk fyri 2013

| **Endamál** | **Støða** | **Mál í 2013** | **Tiltøk/Avrik** |
|---|---|---|---|
| At fíggjarætlanin verður løgd við ársbyrjan, so játtanin heldur alt árið. | Játtan er løgd | At játtanin heldur | Regluligt eftirlit við nýtsluni og virkseminum |
| Koma til rættis í nýggja hotellinum | Vit eru við at venja okkum til tær nýggu umstøðurnar og tað nýggja umhvørvi | Fáa húsið fullfíggja við innbúgvi, sum er neyðugt.<br>Implementera nýggjar mannagongdir hjá starvsfólkinum til aðrar umstøður.<br>Nýta peningagávur til umhugsandi betring av støðunum hjá sjúklingunum | Innheinta tilboð uppá vantandi innbúgv<br>Mannagongdir viderast<br>Bólkur niðursetast til endamálið |
| Roknskaparreglugerð<br><br>Dagføra roknskaparreglugerð fyri Sjúklingahotellið, sum Heilsumálaráðið skal góðkenna | Uppskot til roknskaparreglugerð er gjørt | At Sjúklingahotellið hevur eina dagførda roknskaparreglegerð, sum er týðulig og greitt lýsir øll viðurskifti um roknskaparhaldið hjá Sjúklingahotellinum | Verðandi rokn-skaparreglugerð verður ajourførd og góðkend í 2013. |
| Lýsa virksemið | Samband er ikki millum roknskapartøl og virksemistøl | At Sjúklingahotellið fær ein hátt at gera kostnaðarmetingar av virkseminum | Tilrætta kostnaðin eftir virkseminum og talinum av yvirnáttingum |
| Umleggja roknskaparligu skrásetingina | KPMG røkir uppgávuna | At fáa bókhaldið inn í húsið og at lække útreiðslurnar | Upplæring av starvsfólki og íverksetan |

Tórshavn tann 13. juni 2013

Sjúklingahotellið Tórshavn — Heilsumálaráðið

________________________ — ________________________

Anna Maria Durhuus, stovnsleiðari — Turid Arge, aðalstjóri